# Mótasýningin á Platform

MÓTI
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin*

### Øðrvísi mótasýning

Seinasta fríggjakvøld var stórt mótashow á Platform. Luttakandi handlar vóru Siri, Juniik, Diva, Teir & Tara, Deres og Trend Floor.

Talan var sum heild um eina ógvuliga breiða mótaframsýning. Stórur munur var á handlunum, bæði hvat viðvíkti hugflognum á framførðsluni, klæðunum og modellunum.

Serliga Trend Floor skilti seg burturúr, sum verandi heilt øðrvísi. Tey høvdu veruliga gjørt sær ómak at fáa eitt show burturúr.

Modellirnar vóru nógv smurdar, høvdu stórt tuperað hár, og tyktust ganga ógvuliga avslappað, næstan slaskut. À pallin høvdu tey sett eina wc-kummu og eina stóra klædnadukku, sum vóru sproytaðar við ymsum neon litum. Tey settu ein ógvuliga ráan dám á sýningina, t.d. nýttu tey ketur at leiða hvønnannan við og tað tyktist ikki nerva tey stórvegis, at fullur salur av fólki sat og hugdi at teimum.














Eisini Teir & Tara høvdu nakað av sama ráa stíli í síni sýning. Tey trý, ið gingu, gjørdu nógv við at nerta hvønnannan og flirta yvirdrivið og frekt.

Showið byrjaði við, at mannliga modellin skræddi blusuna av sær og bleiv síðani latin úr buksunum av kvinnuligu modellunum. Av og á var harða image'ið tó í so nógv yvirdrivið, so tað gjørdist komiskt. T.d. tá hann gekk við tveimum strektum longutongum út eftir gólvinum. Men tað var deiligt at síggja eitt frískt og øðrvísið show.

Modellini hjá Trend Floor og Teir & Tara gingu ikki bert aftur og fram, við føstum steðgistøðum, men tað tyktiskt meira ella minni tilvildarligt nær og hvar tey støðgaðu.

Restin av handlunum, sum vóru við, høvdu meira siðbundnar sýningar. Vektin var løgd á at sýna klæðini fram, ístaðin fyri at skapa eina øðrvísi sýning.

Tó riggaði tað sera væl hjá Siri, at modellirnar ikki gingu púra naknar, men vóru í neutralum, klassiskum klædnasettum, sum tær knappaðu upp, fyri at vísa undirklæðini.

### Nýggjasti mótin

Haldi ikki, at nakað kollveltandi nýtt var at síggja á sýningini, so stílurin fyri summarið tykist ikki broytast tað stóra.

Bæði strammar og baggy cowboybuksur eru eftir øllum at døma líka smartar enn. Nærum allir handlarnir høvdu cowboybuksur við í sýningini.

Toppar og blusur skulu helst vísa eitt sindur av húð, antin við víðum hálsi, so akslarnar koma undan ella við niðurringaðum ryggi ella bringu. Litirnir eru antin sterkir, við skríggjandi gulum og appelsingulum, aquabláum og sterkt grønum ella pastell litir við babybláum, ljósareyðum, mintgrønum og ljósagulum.

Skal tað vera meiri avslappað og gerandis, so eru joggingklæðini enn á móta. Heilt lágar og víðar buksur og troyggjur, sum vísa akslar.

### Minni gott við sýningini

Hóast sýningin var spennandi og øðrvísi, so er tó okkurt at seta fingurin á.

Hølini í Platform eru ikki vælegnað til eina sýning sum hesa. T.d. var eingin pallur til modellirnar at ganga á. Tey, ið ikki sótu fremst, sóu tískil ikki serliga væl og ónøgd hoyrdist um hetta eftir sýningina.

Eisini var onkur handil, ið sýndi fram klæðir, sum langt síðani eru útseld. Tað tykist mær eitt sindur løgið at vísa fólki mótaklæðir, sum tey ikki longur kunnu ogna sær.

Eitt triðja, sum fólk fýltust á eftir sýningina, var, at hon var rættiliga langdrigin. Tað er ov leingi at sita knappan hálvanannan tíma og hyggja, serliga tá øll ikki síggja nóg væl.

LANGUR LEYGARDAGUR

**DAMUSKÓGVAR**

*Fáast svartir og hvítir v/silvur*



**249,-**

Pf. FÓTBÚNI
TRÓNDARGØTA 23 • TLF. 31 17 05
EURO SKO EURO SKO

Sosialurin 341800

**Jack Ashore skjúrtur**

**Støddir frá 39 til 50**

**Tilboð**



**1 stk. kr. 159,-**

**Tak 2 fyri kr. 250,-**

**Kallkyn**
Vágsbotnur • Tel. 31 62 06

LANGAN LEYGARDAG



Allar sengur -20%

NÓGVIR NÝGGIR STÓLAR HVØRJA VIKU



VØGGAN
Tel 31 90 88 Niels Winthersgøta 9 Tórshavn
Tel 44 95 88 - Fax 44 94 99 Heiðavegur Saltangará

# Nógv nýtt heimkomið



Pútur 2 stk einans
**kr. 100,-**

Gardinur 2 stk
á 140 x 220 cm
Litur: natúr og sand
**kr. 99,-**

Urtapottar
**– 30%**

Thomas Dam búnýti
Niels Finsensgøta 18 - Tel 31 49 30 - Tórshavn
Á Høgabóli - Tel 44 76 04 - Runavík